# AMU-Skeið

**Nógvir føroyingar hava gjøgnum árini verið á AMU-skeið í Danmark. Í samband við førleikagevandi skeið eru tað serliga tey størru skeiðini innan lyftiútgerð / kranar, ið føroyingar hava tikið í Danmark, tí tey fáast ikki í Føroyum.**



*Tilvildarlig mynd – Karl Joensen*

Eftir 31. juli 2007 bar ikki longur til hjá føroyingum at luttaka á sonevndu AMU-skeiðunum í Danmark

Hesi skeið umfata m.a. øll skeið, sum hava við lyftiútgerð at gera, s.s.:

- Lastbilmonteraðan krana,
- Mobilkrana,
- Tornkrana og
- Traverskrana.

**Grønlændere og færinger – ingen adgang – ingen VEU**

Grønlændere og færinger uden fast bopæl eller beskæftigelse i Danmark har efter den 31. juli 2007 ikke adgang til arbejdsmarkedsuddannelser og dermed heller ikke ret til VEU-godtgørelse. Se bekendtgørelse nr. 806 af 29. juni 2007 om fælles kompetencebeskrivelser for erhvervsrettet voksen- og efteruddannelse og om arbejdsmarkedsuddannelser.

Áðrenn áðurnevnda dato kundu føroyingar luttaka á skeiðunum á jøvnum føti við danskarar.

Eftir 31. juli 2007 var einasti møguleiki hjá føroyingum, um onkur ynskti at fáa eitt førleikagevandi skeið frá AMU, at keypa eitt heilt skeið.

Eftir ætlan verður aftur møguleiki hjá føroyingum at luttaka á donsku AMU-skeiðunum, frá 1. januar 2010, tá nýggj donsk kunngerð ætlandi kemur í gildið.
Munurin millum føroyingar og danskarar verður nú, at danskarar bert gjalda eitt minni luttøkugjald, meðan føroyingar skulu gjalda allan kostnaðin fyri skeiðið.

Sum dømi kann nevnast eitt skeið sum gevur førleika at passa ein "Mobilkran" kemur at kosta umleið kr. 22.000,-.
Hartil kemur kostnaður fyri ferðing fram og aftur, eins og inntøkumissur.

Legg tó til merkis at skeið til lastbilmonteraðan krana D og E framvegis fáast í Føroyum.

***Arbeiðseftirlitið***

***14. desember 2009***